# ítróttur

Nr. 211 • hósdagur • 6. november 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo


## Einki nýtt Rosenborg



*Í hesum førinum vísti tað seg, at Jákup var áhugaður í einum skifti, og tann møguleikin var alt ov góður, til at vit kundu lata hann fara, heldur Birgir Enghamar*

**Málið hjá HB er framvegis at ala sum mest av egnum fólki, men møguleikin við Jákupi á Borg var ov góður, til at hann kundi fara framvið**

HB-FORMAÐURIN
*Jákup Mørk*

Sum vera man, so er formaðurin í HB, Birgir Enghamar, sera væl nøgdir um, at tað nú hevur eydnast felagnum at styrkt um hópin við einum av avgjørt bestu leikarunum í heimligu kappingini.

- Tað er einki at ivast í, at vit eru fegnir um, at tað hevur eydnast okkum at fáa Jákup á Borg í hópin. Hann er jú ein av teimum absolutt bestu føroysku leikarunum yvirhøvur, og tað er ikki so ofta, at tú hevur møguleikar at knýta slíkar leikarar at liðnum, sigur Birgir.

B36-formaðurin hevur borið fram, at HB nokk hevði givið Jákupi eitt tilboð, sum hann ikki fekk sagt nei til. HB hevur jú vunnið meistaraheitið tvey ár á rað, og brutto kastar hetta einar tríggjar milliónir av sær í luttøkugjaldi frá UEFA. Hevur hetta viðvirka til, at HB so smátt er um at gerast ein veruligur risi í stíli við t.d. norska Rosenborg. Tað vil siga eitt felag, sum kann taka bestu leikararnar frá kappingarneytunum, og á tann hátt hava eina at kalla serstøðu?

- Nei. Tað er ein støða, sum eg ongan tíð rokni við fer at koma í føroyskum fótbólti. Í HB hava vit í øllum førum framvegis sama politikkin. Vit skulu fyrst og fremst uppala okkara egnu leikarar, og málið er sjálvsagt, at hesir skulu vera millum teir bestu í landinum. Fíggjarliga trúgvi eg einki uppá, at føroyskur fótbóltur kann bera eitt felag, har liðið at kalla verður keypt inn.

- Hinvegin sigur tað seg sjálvt, at vit eisini royna at styrkja um hópin so hvørt. Í hesum førinum vísti tað seg, at Jákup var áhugaður í einum skifti, og tann møguleikin var alt ov góður, til at vit kundu lata hann fara, heldur Birgir.

Og at enda leggur formaðurin afturat, at hann væl er greiður um, at hetta er nakað, sum vekir sterkar kenslur hjá grannunum. Men hann leggur í sama viðfangi dent á, at hesar kenslurnar í sjálvum sær ikki vóru nakað mál hjá HB í hesum.

- Vit hava sjálvir staðið í støðuni, sum B36 er í nú. Og vit vóru sera vónsviknir, tá eitt nú Julian Johnsson, Sigfríður Clementsen, John Heri Dam og Bárður Mortansson valdu at skifta til B36. Har misti felagið nakrar leikarar á ein hátt, sum vit framvegis iðra okkum um, men trupulleikin var tá helst, at vit ikki gjørdu okkara heimaarbeiði til lítar. Tað hava vit roynt at tikið við læru av, og sjálvur haldi eg, at vit nú eru sera væl fyri til árið, har vit skulu halda 100 ára dag okkara. Hetta verður í mangar mátar eitt spennandi ár, og eg ivist ikki í, at hetta eisini hevur verið ein av orsøkunum til, at Jákup á Borg hevur tikið sína avgerð.

# Spennandi avbjóðing

**- Eg fái eingi hús, men ein nakað betraðan sáttmála. Og ikki minst, so fái eg eisini nýggjar avbjóðingar, sum heilt víst kunnu verða mennandi hjá mær, sigur Jákup á Borg millum annað, nú hann fer at leika í reyð/svarta HB-búnanum**

LEIKARIN
*Jákup Mørk*




*Nýggi níggjarin hjá HB. Jákup á Borg hevur longu fingið troyggjuna, sum hann skal spæla í komandi ár*

Jákup á Borg spælir í HB næsta ár. Boðini mundu fara sum ein ylur kring alla Havnina, og fyri tann stóra partin av føroyingum, sum hava áhuga í fótbólti, var talan um ein lítlan skelk. Ikki so nógv tí talan var um eitt leikaraskifti, tí tey eru hóast alt nøkur ígjøgnum ein drúgvan fótbóltssteðg, men tí talan var um eina av absolutto stjørnunum, sum skifti millum argastu kappingarneytarnar.

Reyð/svørtu viðhaldsfólkini, sum halda til í norðara partinum av Gundadali mundu vera tey, sum fegnaðust mest um hetta. Ikki bara hevur felagið við hesum fingið ein góðan leikara, men kanska minst líka týdningamikið, so hava tey longu vunnið fyrsta stóra slagið móti grannunum úr B36.

### Eingi hús

Hóast hetta soleiðis er nakað, sum heilt víst vekir sterkar kenslur í báðum havnarlegunum, so var tað tó ein avkláraður Jákup á Borg, sum vit fingu orðið á, tá skiftið var veruleiki. Eitt skifti, sum merkir, at hann eftir 18 ár í B36 - harav átta á besta liðnum - fyri fyrstu ferð skal royna seg í øðrum felagi.

- Fyrst og fremst, so má eg siga, at eg ikki havi nakra ætlan um at klamsa við hurðini, nú eg havi valt at skifta felag. Eg havi havt nógv ótrúliga góð ár í B36, og í nógvar mátar hevur felagið verið sum eitt heim hjá mær. Nógvar av vinum mínum havi eg fingið her, og tí kann tað eisini kennast eitt sindur tungt at fara avstað, leggur hann fyri.

Men hetta hevur so sjálvandi eisini sínar orsøkir, leggur hann afturat. Úr B36 vóru boðini, at HB hevur givið leikaranum eitt tilboð, sum hann illa fekk sagt nei til, men hesum er leikarin nú ikki so samdur í.

- Eg skal nú ikki siga, at tað er ein vánaligur sáttmáli, sum eg havi fingið. Men tað er altso ikki so gott, sum fólk vilja gera tað til. Sjálvur rokni eg eisini við, at eg væl kundi fingið meira í onkrum felagi úti á bygd, um eg bara vildi selja meg sjálvan so dýrt sum gjørligt, men tað er so ikki tað, sum hevur vigað mest í øllum hesum. Og lat meg so eisini siga alt fyri eitt, at eg ikki havi fingið nakað hús frá Høgna Mikkelsen, soleiðis sum slaturin annars hevur ljóðað. Sum partur av leiðsluni í HB hevur Høgni sjálvandi verið ein av teimum, sum eg havi tosað við, men meira enn tað er tað so ikki.

- Fyrst og fremst, so haldi eg, at eg fekk eina sera góða viðferð, nú eg tosaði við HB. Teir hava lurtað eftir mínum sjónarmiðjum. Leiðslan tykist arbeiða ógvuliga miðvíst móti komandi kappingarári, og tað er so ein kensla, sum eg ikki í eins stóran mun havi kent, tá eg havi tosað við B36. Ikki tí at B36 ikki stílar høgt, men onkursvegna tykist hetta betri skipað í HB. Og B36 visti av, at eg ikki ætlaði at skriva undir nýggjan sáttmála beinanvegin. Eg segði teimum, at útspælið hjá teimum til nýggjan sáttmála var ikki nøktandi, men eg havi ikki hoyrt nakað aftur. Kanska kundi eg pressa sitrónina við at siga, hvørji onnur tilboð vóru, men tað valdi eg so ikki at gera, tí eg tími ikki at verða skýrdur sum ein, ið bert hugsar um pengar.

- Og ítróttarliga er hetta eisini ein stór avbjóðing hjá mær. HB fyllir 100 ár komandi ár, og í nógvar mátar tykist hetta gerast sera spennandi. Tað kann vera ein avbjóðing, sum fær meg at geva meg enn meira. Sjálvur var eg so ikki nøgdur við persónliga avrikið hjá mær í fjør. Tað er kanska eisini so, at eg nú havi spælt øll árini við B36, og at tað tí kanska koyrir ov nógv í sama spori. Nú skal eg í øllum førum prógva í HB, at eg skal hava fast pláss á liðnum, og sjálvandi skal eg eisini prógva fyri B36, at teir burdu hildið betri fast í mær.

### Heit móttøka

Sum nevnt, so vóru øll helst ikki eins fegin, nú skiftið gjørdist veruleiki, og sjálvur viðgongur Jákup eisini, at boð vóru oftani eftir honum týsdagin.

- Telefonin ringdi at kalla út í eitt, og at enda tímdi eg ikki at taka hana. Eg hevði hóast alt kunnað leiðslu og viðleikarar í B36, umframt tey nærmastu. At onnur so eisini vildu hava nakað at vita, fái eg ikki gjørt so nógv við. Gjørdi eg tað, so tosaði eg í telefonini allan dagin, og tað tímdi eg altso ikki. Hósdagin fari eg niður at hyggja at FCK og Mallorca, og so fái eg vónandi eitt sindur av friði, sigur hann við einum lítlum smíli.

Men hvussu víkir og vendir, so er einki at ivast í, at talan verður um eina heita móttøku, tá hann einaferð komandi ár skal spæla grannauppgerð í Gundadali. Hesa ferð við B36 sum mótstøðuliði, og Jákup tykist eisini greiður um, hvat tá bíðar eftir honum.

- Sjálvandi kanst tú ikki fyrireika teg heilt neyvt til tað, sum tá fer at henda. Men nú spæli eg so við HB, og har ætli eg mær at gera alt tað, sum stendur í mínari makt, til tess at vinna - eisini móti B36. Hinvegin fara tey í B36 helst at gera sítt til, at dagurin hjá mær til ta tíð ikki skal gerast so góður, men tað má eg bara góðtaka. Rivaliseringin er ein partur av spælinum, og eg veit væl, hvussu nógv hetta hevur at siga fyri summi, so tað skulu tey hava loyvi til. Men eg vóni bara, at tey hóast alt eisini duga at síggja hetta frá mínari síðu, sigur Jákup á Borg at enda.

## Ein katastrofa hjá B36



*Kristian á Neystabø var fáorðaður um júst staðfesta leikaraskiftið, men eingin ivi er um, at felag hansara hevur fingið ein frammaná frá grannunum*

**B36-formaðurin er fáorðaður, nú felagið hevur mist kanska størstu stjørnuna. Men eingin ivi er um, at annars tryggir grundvøllurin undir syðra húsinum í Gundadali so smátt er farin at ridla**

B36
*Jákup Mørk*

Í syðra partinum av Gundadali vórðu boðini um stóra leikaraskiftið týsdagin ikki møtt við somu gleði, sum tey vórðu í HB. Eitt er, at felagið við hesum missir ein av bestu leikarunum í landinum. Tað hevur felagið sum so roynt fyrr. Men tað at talan í hesum førinum er um kanska besta leikaran, sum felagið hevur uppalt seinastu nógvu árini, og at skiftið er til júst grannarnar úr HB, er nakað, sum tekur heilt meint.

Sum vera man, so var formaðurin í B36, Kristian á Neystabø, fáorð-aður, tá vit fingu orðið á hann seinnapartin týsdagin.

- Sjálvandi kemur maður í mans stað, men í hesum førinum verður tað tungt.

- Sum eg skilji tað, so hevur hann fingið eitt sera gott tilboð frá HB, sum hann hevur tikið av. Og eg fái ikki sagt annað, enn at eg vísi til tíð-indaskrivið, sum HB hevur sent út. Hvat Jákupi sjálvum viðvíkur, so er hann nokk førur fyri at svara seg, sigur formaðurin í B36.

### Meira enn ein leikari

Men hóast fáu orðini, so er nokk eingin ivi um, at hann eins væl og onnur er greiður um missin, sum B36 nú hevur verið fyri.

Seinasta góða tíggjuára skeiðið hevur B36 - við Kristian á Neystabø sum oddamanni - lagt fortíðina aftur um seg. Frá at vera fastur partur av botnstríðinum og við hvørt eisini skýrt sum elevator-lið, er felagið í dag at rokna millum tey heilt stóru í føroyskum fótbólti.

Fyri ein stóran part er hendan framgongdin tó bygd á leikarar, sum felagið hevur fingið aðra staðni frá. Tí hóast eitt miðvíst ungdómsarbeiði gjøgnum seinasta partin av áttati- og meginpartin av nítiárunum, so hevur tað í merkiliga lítlan mun eydnast felagnum at ment hesar leikarar til berandi kreftir á besta liðnum. Nógvir hava verið meira og minni fastir í hópinum, og hava so sanniliga átt sín part í úrslitunum, sum felagið hevur vunnið, men tað eru tó fáir, sum hava ment seg upp til avgjørda landsliðsflokkin. Her hevði felagið ein slíkan, og í nógvar mátar hevur Jákup hesi átta árini, sum hann hevur leikt á besta liðnum, verið ein hin størsta fyrimyndin fyri ungdómin í felagnum. Hann hevur í so máta kanska verið ímyndin av framgongdini hjá felagnum, og tí má sigast at B36 við hesum hevur mist nógv meira enn ein góðan leikara.

### Sjálvrannsakan

Stóri spurningurin í felagnum er tí ivaleyst, hvussu tað bar til, at felagið á hendan hátt spældi sær av við største gimsteinin í goymsluni.

Eingin fæst at siga tað fyri vist. Men sjálvur sigur leikarin, at talan ikki var um nakran supersáttmála, sum hann nú hevur tikið av, og formaðurin í HB avvísir eisini, at felagið hevur leitað djúpt í pengapunginum.

Fíggjarliga er tað so einki dulsmál, at B36 man vera sterkasta felagið í landinum. Við at skeita at leikarahópinum, sum felagið hevði eitt nú í fjør, er eisini skjótt at staðfesta, at hesin í pengum man hava verið so nógv tann dýrasti í landinum, men kortini kemur felagið at kalla á hvørjum ári út við yvirskoti um ta hálvu milliónina.

Tí tykist svarið vera, at felagið í ov stóran mun hevur dúvað upp á loyalitetin hjá teimum leikarum, sum eru uppaldir í felagnum, meðan stóru peningaupphæddirnar hinvegin eru nýttar at draga leikarar aðra staðni frá til felagið. At leikarar tosa sínamillum um samsýningina, sum teir fáa, er nokk eingin loyna, og tí kann tað ivaleyst skapa misnøgd, um leikarar lutfalsliga fáa væl minni enn tað, sum teir halda seg standa fyri. Ikki so nógv av fíggjarligum ávum, tí tað munnu hóast alt vera fáir leikarar, sum gerast ríkir av at spæla fótbólt í Føroyum, men einamest tí leikarar við hesum koma at kenna á sær, at teir verða ov lítið virdir av felagnum. Sínum egna felagið væl at merkja.

Hvussu er og ikki, so hevur alt B36 við skiftinum hjá Jákupi á Borg fingið ein rættiligan frammaná, og einki er at ivast í, at hetta er eitt evni, sum kemur at fylla heilt nógv, tá felagi um fáar vikur skal halda árliga aðalfundin. Ein aðalfundur, sum uttan iva enn einaferð kemur at vísa eitt stórt yvirskot í pengum, men sum lættliga kann vísa eitt eins stórt undirskot í teimum virðum, sum ikki kunnu gerast upp á bankabókini.